# Trívast væl millum barnagarðsbørn



**Praktikantar á Sosialinum hava verið og vitjað tveir aðrar praktikantar, sum seinastu 10 dagar hava roynt seg í barnagarði**

PRAKTIKANTAR
*Jytta Drangastein*
*Rannvá Danielsen*

Mánadagin fóru 9. flokkarnir í Argja skúla í starvsvenjing.

Vit hava tosa við Duritu Sloan Jørgensen og Rudi Rasmussen, sum báðar valdu at fara í barnagarð. Vit spurdu, hvussu teimum dámar í barnagarðinum, og hvat tær gera í frítíðini.

### Væl móttikin

Rudi Rasmussen, 14 ár. Hon er í starvsvenjing í Barnagarðinum við Velbastavegin. Hon valdi at fara í starvsvenjing í einum barnagarði, tí henni dámar væl børn. Hon trívist væl har og hon varð væl móttikin.

Saman ganga tey túr, spæla uttanfyri og syngja. Um hon ikki hevði sloppið í barnagarð, hevði hon farið í klæðnahandilin Deres í SMS.

Í frítíðini spælir hon fótbólt við HB og er saman við vinum. Tey hugna sær, ganga runt í býnum, shoppa og annað.

Tá ið hon lurtar eftir tónleiki, lurtar hon eftir føroyskum tónleiki, men tó eisini eftir Backstreet Boys og Westlife.

### Ikki júst sum væntað

Durita Sloan Jørgensen, 15 ár. Hon er í starvsvenjing í Barnagarðinum á Argjum. Orsøkin til at hon valdi at fara í barnagarð, er, at henni dámar væl børn og hon vildi royna okkurt nýtt. Tað er ikki heilt sum hon hevði vænta, tí hon helt at tað fór at verða strævnari. Men øll eru fitt og blíð, og henni dámar væl.

Tey ganga túr við børnunum, spæla uttanfyri, tekna og syngja og annað. Um hon ikki hevði sloppið í barnagarð, hevði hon farið í Røktina, tí henni kundi gott hugsa sær at lært eitt sindur um húðrøkt.

Í frítíðini spælir hon fótbólt við AB, gongur til jazzballet, spælir tvørfloytu og syngur við einum Ten Sing kórið, ið eitur Sound of Glory. Hon er ofta saman við vinum. Tey ganga runt í býnum og shoppa, hugna sær, fara í biograf og annað.

# Adore Music fingið Youth Alive Band aftur til Føroya

**-Í fjør var avstralski gospelbólkurin Youth Alive Band í Føroyum. Adore Music stendur aftanfyri tiltakið, og vænta teir góða undirtøku.**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*



Tey eru 14 í tali og ferðast runt í heiminum alt árið runt og hava konsertir. Tey vóru í Føroyum í fjør, og dámdu teimum ógvuliga væl. Tí eru tey komin aftur til Føroya í ár.

Konsertin verður týskvøldið 23. oktober, klokkan 20.00 í ítróttarhøllini í Runavík. At konsertin verður eitt týskvøld kemst av, at Youth Alive Band er ein ógvuliga væl umtóktur bólkur, sum hevur nógv at gera.

Í vikuskiftinum áðrenn tey koma til Føroya, verða tey í Keypmannahavn, og koma hendan vegin mánadag. Mánakvøldið er ætlanin, at tey skulu hava møti í Kelduni í Skálafirði. Okkurt tiltakið verður eisini á studentaskúlanum á Kambsdali.

170 krónur kostar atgongumerkini til konsertina, og kunnu tey keypast í forsølu í Statoil støðunum á Argjum, Strondum, í Saltangará og í Klaksvík.




# Oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum

Eftirmeting av 1. útbjóðing og framtíðin

Týsdagin 27. november og mikudagin 28. november skipar Oljuvinnufelagið við stuðli frá Oljumálastýrinum og FOIB fyri oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Fyrsta ráðstevnan av sínum slag var fyri einum ári síðani. Hesaferð er evnið ein eftirmeting av 1. útbjóðing – av úrslitunum av teimum fyrstu boringunum undir Føroyum. Har verður so bæði sett fokus á vinnuna, oljufeløgini og Oljumálastýrið og føroyskar myndugleikar. Eisini verður nomið við samfelagsligu avleiðingarnar av eini oljuvinnu.





Eins og í fjør fer Sosialurin at geva út eina serstaka útgávu til ráðstevnuna. Har fara vit at viðgera ráðstevnuna og teir spurningar hon fer at umrøða – í samrøðum, greinum, viðmerkingum o.l.

Einstaklingar, fyritøkur, stovnar og feløg, við tilknýti til eina komandi oljuvinnu, eru vælkomin at brúka hetta góða høvið til at gera vart við seg í serblaðnum. Tað veri seg gjøgnum kunningarskriv, lýsingar o.l.







Fyllið út seðilin og sendið hann til okkara. Sosialurin rindar postgjaldið. Seinasta freist at lata okkum tilfar, kunningarskriv og lýsingar til blaðið er 5. november.

Undirritaði, felag e.l. ynskir at fáa fleiri upplýsingar um serblaðið. Tað veri seg um kunningarskriv, lýsingar e.l.

ÓKEYPIS

Avsendari:

Navn á fyritøku ____________________
Adressa ____________________
Kontaktpers. ____________________
Teldupostur ____________________
Telefon ____________________

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76 110 Tórshavn